# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Javnaðarflokkurin má taka seg um reiggj

Í blaðnum í dag kunngera vit eina veljarakanning, sum vísir at Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin standa til stóra afturgongd. Av samgonguflokkunum er tað bert Sambandsflokkurin, sum stendur seg væl – serliga havandi í huga, at hann eftir at hava verið illa fyri í nógvum kanningum, nú fær sama úrslit, sum hann hevði við síðsta val. Hann hevur við øðrum orðum klárað at strítt seg uppaftur á ta undirtøkuna, hann hevði við valið seinast.

Hinvegin er tað serliga Miðflokkurin, sum fer við framgongdini. Flokkurin tvífaldar sítt atkvøðutal í mun til seinasta val. Hetta gevur flokkinum ein tingmann afturat, og er tað kanska Karsten Hansen effektin, sum ávirkar.

Undanførslurnar hjá einum leiðandi samgongufloki plaga at vera, at tað slítur at sita við ábyrgd. Men tað er ikki gott nokk. Javnaðarflokkurin hevur bara ikki verið nóg sjonligur í hesum valskeiðinum. Flokkurin kom úr ein ørkenvandring í andstøðu í átta ár inn í samgonguhitan - og tók við landsins leiðslu, sum flokkurin misti við svíðandi valið í 1994, tá flokkurin fór niður í helvt. Hann fór frá at hava tíggju tingfólk niður í fimm.

Jú, rætt er, at serligar umstøður vóru tá. Men veljarakanningin í dag vísir, at flokkurøin ikki enn hevur megnað at lyft seg burtur úr teirri støðu, flokkurin kom í í 1994.

Við komandi val verður í øllum førum ein útskifting í tingmanningini. Ellispresidentarnir Vilhelm Johannesen og Henrik Old hava boðað frá, at teir ikki stilla uppaftur. Roknast kann við, at hin suðuroyartingmaðurin tekur somu støðu, nú hann nærkast 75.

Kvinnuumboðanin hjá Javnaðarflokkinum er katastrofal. Eingin vald á ting og eingin sett í landsstýrið. Týðuligar kvinnurøddir í Suðurstreymoy tosa um at gera ein serligan innanfloks kvinnulista. Hetta ljóðar sera áhugavert, um tað veruliga skal ber til at stilla kvinnur upp, sum veruliga hava kjans at verða valdar. Her eru kanska løgfrøðisligar forðingar, men vælsignaðu menn vísið nú dygdir. Gerið nakað ordiligt til tess at fáa kvinnurnar framat eisini. Tað kann bara bøta um støðuna hjá flokkinum, sum valla fær verið verri.

**Sosialurin**

## Prógv – takk!

HELGI ABRAHAMSEN



Í eini føðingardagsheilsan til Føroya Studentaskúla, sum stóð í Sosialinum seinasta vikuskifti, royndi John Johannesen, løgtingsmaður, at geva Sambandsflokkinum skuldina fyri, at studentaskúlin í Hoydølum hevur hølistrupulleikar.
Tað er ein løgin póstandur at sleingja út í eini føðingardagsheilsan. Serliga fyri tey sum kenna ta veruligu søguna aftanfyri málið, kann hetta tykjast løgið.

Men tað sum fær meg at gera hesa viðmerking, er ein annar kendur pástandur úr leysum lofti, sum løgtingsmaðurin eisini førdi fram í somu føðingardagsheilsan. Pástandurin er, at Sambandsflokkurin skal hava verið ímóti føroyskum flogsambandi við útheimin.

Eg fari at heita á John Johannesen um at greiða nærri frá, hvat hann ítøkiliga hugsar um, tá hann sigur hetta. Til dømis kann hann svara hesum spurningunum:

Var Sambandsflokkurin ímóti, at partafelagið Atlantic Airways varð sett á stovn í 1987?

Var Sambandsflokkurin ímóti at 1,02 mió. krónur í partapeningi vórðu settar í partafelagið Atlantic Airways?

Var Sambandsflokkurin ímóti at landskassin veitti 75 mió. krónur í veðhaldi fyri P/F Atlantic Airways í 1989?

Sambært Løgtingstíðindum tók Sambandsflokkurin undir við øllum hesum uppskotunum.

Tá John hevur leitað síni "prógv" fram, kann hann hóskandi koma við eini nærri frágreiðing um, hvat hann byggir sín pástand á.

## Hví so firtin Birgir?

TRYGVI F. GUTTESEN



Góði Birgir, brádliga rópar tú meg nú fyri harra Guttesen, hví so øðiliga hátíðarligur?

Hví ikki bara svara upp á einfaldar spurningar?

Birgir, tú má vera meira ítøkiligur, skriving um skeivan politikk, ivasamar heimildir, vantandi álit og trúvirðir, solupolitikk og grátikonupolitikk, gevur einki svar upp á nakað.

Í vónini um at tú ert í betri hýri nú, vil eg kortini loyva mær enn einaferð at spyrja:

Nær og hvussu hevur Sambandsflokkurin brotið gjørda avtalu um Sandoyartunnilin?

Hvussu kunnu hugsanir hjá einum landsstýrismanni vera brot á gjørdar avtalur?

Er tað brot á gjørdar avtalur um Magni Laksáfoss loyvir sær at tosa um raðfestingar?

Er tað brot á samgonguskjalið um Magni Laksáfoss hevur eina hugsan um, hvussu Sandoyartunnilin kundi verið raðfestur?

Hvør er tað nú, sum hevur brotið gjørdar avtalur við at framtúra við persónligum sjónarmiðum?

Er tað bannað at hava persónlig sjónarmið í politikki?

Nær, hvar og hvussu er miðøkið friðhalgað av Sambandsflokkinum?

## Nú skal bispavalið eisini amerikuserast

JOHN S. MYLLHAMAR



Tað hevur eydnast miðlunum, í hvussu so er tey bæði seinastu løgtingsvalini, at fáa høvuðsvalstríðið at snúgva seg um sexlívið hjá fólki. Nú stendur eitt bispaval fyri durum, og hann hjálpi mær, verður nú eisini royndt at fáa hetta valið í høvuðsheitinum at snúgva seg um, hvørja støðu nýggi bispurin hevur til sex.

Eg vil heita á bispavalevnini um at siga nei til at lata fjølmiðlarnar misbrúka seg við at amerikusera eitt føroyskt bispaval.

Tað gagnar hvørki tykkum ella kirkjufólkinum, at svara teimum oftast óviðkomandi og tápuligu spurningum, sum hesi finna uppá at seta. Tey, sum royna at fáa valið at snúgva seg um nakað annað enn, hvat eitt bispastarv er, eru oftast fólk, sum einki hava við kirkjuna at gera og neyvan nakrantíð koma har.

Teir einstøku kirkjuráðslimirnir kunnu, um teir hava hug, spyrja tað valevnið, teir ætla at velja, hvat teimum liggur á hjarta.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.